# Karl Johansen til minnis

Fríggjamorgunin 15. februar bórust tíðindini, at Karl Johansen var deyður. Feigdarboðini kendust óverulig, og hevði tú eitt bil kensluna av at verða tikin av fótum.

Karl var maður sum fólk góðu sær far um, ein maður við greiðum sjónarmiðum, ein maður, sum flestu tóku støðu til. Tí er tøgnin, nú Karl er farin, so rámandi.

Karl var serstakliga virdur fyri sítt virki sum formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag. Hann gjørdist nevndarlimur í 1975 og í 1977 formaður, og røkti hann hetta álitisstarv fyrimyndarliga líka til hann nú brádliga andaðist.

Vit eru mong, sum við virðing skoða aftur á sjáldsama góða handalagið hjá Karl í gerandisvirki hansara fyri limir felagsins. Ein maður, sum breyt úr nýggjum, og sum legði lunnar undir nýhugsan í tí virk-semi, hann virkaði og livdi fyri.

Karl var kontroversiellur og samstundis sera sympatiskur. Tí vakti hann positivar kenslur hjá fólki – kenslur, sum vóru lunnar undir hansara hepnu hond í fakfelagsyrkinum.

Hetta var serliga sjónligt, tá hann stóð á odda fyri ótaldu samráðingunum fjóðringsøldina hann myndaði Havnar Arbeiðsmannafelag. Tað verður sagt um Karl, at hann dugdi avbera væl at skapa eitt hugnaligt og gevandi samráðingarumhvørvi. Soleiðis eydnaðist tað honum, ferð eftir ferð at undirskriva sáttmála vegna sínar limir, uttan at neyðugt var við tiltøkum á arbeiðsmarknaðinum. Ja, onkur hevur tikið til, at arbeiðsgevararnir dámdu at ganga krøvum hansara møti.

Samanumtikið man Karl metast at hava verið millum fremstu og dugnaligastu fakfelagsleiðarar í Føroyum yvirhøvur.

At Karl myndaði Havnar Arbeiðsmannafelag í fjóðringsøld er eisini prógv um, at limirnir hava verið stak væl nøgdir við avrik hansara. Og teir fóru ikki skeivir, tá teir litu á hansara samráðingarhegni.

Ein tann størsti varðin, ið stendur eftir Karl sum formann fyri Havnar Arbeiðsmannafelag, er eftirlønargrunnurin, sum hann megnaði at stovnseta longu í 1983. Henda skipan, sum gjørdi munin fyri verkamannin, tá hann fór um pensiónsaldur. Tað má tí metast stórt spell, at Karl ikki sjálvur kundi njóta úrslitið av hesum stóra átaki, sum hann framdi vegna limir sínar í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Var Karl álitismaður í gerandisdegnum, so var hann eins hugvekjandi at vera saman við í vertskapi. Prátingarsamur og blíður. Harumfarmt skemtingarsamur. Karl fylti nógv, har hann var. Hevði eina fevnandi persónmendsku. Hetta munni ikki minst hansara starvsfelagar sanna.

Tað er við sorgblídni at hesar reglur verða feldar á blað. Við ynski um samhuga til tykkara – Thea, børnini og familjan annars, sum mist hava, vil eg lýsa frið yvir minnið um undangongu- og hugsjónarmannin Karl Johansen.

***Bjarni Djurholm***

# Minningarorð um Jonu Joensen



Tað kennist so ómetaliga torført og tungt at skriva nøkur orð til minnis um teg, góða systir, nú tú ikki ert ímillum okkum. Tað var, sum steðgaði alt upp tá vit fingu at vita, at tú vart farin. Hettar er so óskiljandi, og eg fati tað ikki rættiliga enn. Tað verður tungt at koma út í heim títt og tú, góða systir, ikki ert har – tú, sum altíð var inni!

Tó fram úr myrkrinum lýsir vónin og vissan, at skjótt skulu vit møtast aftur, har sjúka, deyði og skilnaður ikki eru! Hvør framtíð!

Góði Malvinus! Tú hevur mist eina góða konu. Í Orðt. 31:10 stendur: "Dugnaliga konu – hvør finnur hana? Manga meir enn perlur er hon verd!" Og hetta kann av røttum sigast um Jonu systir – dugnalig, og altíð við tí góða. Hon hevði so stóra umsorgan fyri tær, fyri børnum tykkara, ommu- og langommubørnunum, og vildi, at teimum skuldi gangast væl.

Paulus sigur í Róm. 8: "Hvør skal skilja okkum frá kærleika Kristusar! Trongd, angist, atsókn, hungur, nakinleiki, vandi ella svørð! Nei eg eri vísur í, at hvørki deyði ella lív, hvørki einglar ella harradømi, hvørki tað, sum nú er, ella tað, sum koma skal, ella maktir, hvørki hitt høga, hitt djúpa ella nakað annað, ið skapt er, skal fáa skilt okkum frá kærleika Guds í Kristi Jesusi, Harra okkara.!"

Kortini sakna vit, kortini syrgja og gráta vit – men við vón! Vit skulu hittast aftur, tí hetta ber orð Guds okkum greið boð um! Harrin styrki okkum í sorgini.

Friður verður við minninum um systir mína Jonu!

***Ella við familju***


Nú kanst tú søkja um starvið sum

## Stjóri í Granskingarráðnum

Starvið
Starvið sum stjóri í nýskipaða Granskingarráðnum er leyst at søkja. Starvið verður sett sambært løgtingslóg nr. 85 frá 15. mai 2001, og stjórin skal m.a.:

- umsita Granskingargrunnin í samstarvi við Granskingarráðið
- gera uppskot til fíggjarætlan at leggja fyri Granskingarráðið
- hava ábyrgdina av, at fíggjarætlanin verður hildin
- hava ábyrgdina av eftirlitinum við játtaðum studningum.
- útinna tær yvirskipaðu ætlanir, sum Granskingarráðið samtykkir.
- samskipa tey fakligu og strategisku sjónarmiðini hjá Granskingarráðnum
- virka fyri at gera granskingartilfar lættari atkomiligt hjá granskarum, vinnulívi og almenningi
- virka fyri at økja samskiftið innan føroyska granskingarumhvørvið og millum granskarar og vinnulív

Førleikakrøv

Umsøkjarin skal:

- hava viðkomandi útbúgving frá lærdum háskúla
- kunna vátta, at hann er førur fyri at átaka sær tær umsitingarligu skyldur, sum fylgja við starvinum
- hava góð samstarvsevni
- vera sannførdur um tann týdning, ið gransking hevur fyri eitt nútíðar samfelag
- vera sinnaður at leggja bæði orku og hugflog í at bera føroyska gransking framá
- hava vilja og evni til at royna nýggjar leiðir

Setanar- og lønartreytir
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag. Talan kann verða um at starvið verður áramálssett, t.d. í 5 ár, við einum lønarískoyti sum partarnir samráðast um.

Umsókn
Umsóknir við prógvum, c.v. o.ø. skulu sendast til:

Granskingarráðið
J. C. Svabosgøta 14
Postrúm 272
FO-110 Tórshavn

Og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 27. mars 2002

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Guðrið Andorsdóttir, virkandi formann í Granskingarráðnum, tlf 210316

Gransking er gjølligar kanningar av ávísum evni til at økja vitanina um tað. 'Granskingar- og menningarvirksemi' (G&M) er skapandi arbeiði á skipaðum grundarlagi, sum hevur til endamáls at økja vísindaliga og tøkniliga kunnleikan; ella at brúka kunnleika, sum longu er til, og vísa á nýggja, praktiska nýtslu. Hugtakið 'granskingar- og menningarvirksemi' umfatar grundgransking, nýtta gransking og menningararbeiði.

- Grundgransking brýtur upp úr nýggjum, ger royndir ella er teoretiskt, ástøðiligt arbeiði, sum fyrst av øllum hevur til endamáls at fáa nýggja vitan og fatan til vegar uttan at hava ávísa nýtlsu í hýggju.
- Nýtt gransking fær somuleiðis nýggja vitan og fatan til vega, men nýtt gransking miðar fyrst av øllum ímóti at fremja ávís praktisk mál.
- Menningararbeiði er skipað arbeiði, sum er grundað á kunnleika, sum er fingin til vegar gjøgnum gransking og/ella praktiskar royndir við tí fyri eyga at skapa nýtt ella munandi bøtt tilfar, nýggjar og betri vørur, tilgongdir, skipanir ella tænastur.

OECD-definitiónir.

SANSIR TEL 355 355

granskingarráðið
THE FAROESE RESEARCH COUNCIL

Granskingarráðið · J.C. Svabos gøtu 14 · Postrúm 272 · FO-110 Tórshavn
Tel 31 53 02 · Fax 31 89 29 · annikas@setur.fo




# Bót fyri ófólkaligleika

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Mánanáttina klokkan fimm varð ein ungur maður tikin fyri at vera ófólkaligur móti løgregluni.

Løgreglubilurin koyrdi í býnum, tá ein ungur maður í einum øðrum bili rullar rútin niður og fer at gera ófólkalig tekin móti løgreglumonnunum.

Bilurin við tí unga manninum varð steðgaður og ungi maðurin tikin. Hann verður ákærdur fyri at vera ófólkaligur móti løgregluni, og hann kann vænta sær eina bót.

Løgreglan í Havn hevði eisini einar tíggju ávirkaðar persónar á støðini at sova rúsin av sær um vikuskiftið.

# Matstovur kannaðar

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Løgreglan í Havn hevði um vikuskiftið eitt átak móti matstovum og barrum við skeinkiloyvi. Kannað varð, um hesi høvdu tey neyðugu loyvini og um loyvini vóru greitt frámerkt og sýnd fram á staðnum.

Vakthavandi á løgreglustøðini sigur, at tey flestu støðini í Havnini vórðu eftirspurd, og tað vísti seg, at fleiri av hesum ikki høvdu hesi viðurskifti í lagi.

Høvuðsloyvið var í lagi, men tey flestu støðini høvdu ikki hongt hesi loyvi upp á sjónligum stað í matstovuni ella barrini, sum lógin fyriskipar.

Eigararnir hava fyrst fingið eina ávaring frá løgregluni um at fáa hesi viðurskifti í rættlag.

# Koyra ov skjótt

FERÐKANNINGAR
*Stefan í Skorini*

Løgreglan í Havn hevur um vikuskiftið gjørt fleiri ferðkanningar við nýggja lasara-tólinum. Løgreglufólk vóru úti fríggjadagin, leygardagin og sunnudagin og mátaði ferðina hjá bilum.

Vakthavandi á løgreglustøðini sigur, einar tíggju frágreiðingar eru skrivaðar, og at nøkur av hesum hava fingið treytaða frádøming av koyrikortinum.

Sagt verður av støðini, at bilførarar sum heild koyra alt ov skjótt, og at nýggja ferðslulógin birtir uppundir ov nógva ferð á føroysku vegunum.

Orsøkin er, at bilførarar nú bara fáa treytaða frádøming av koyrikortinum, sum merkir, at førarin skal upp til nýggja koyriroynd. Hann hevur samstundis ein treytaðan dóm, og ger førarin eitt álvarsamt mistak afturat í ferðsluni, missir hann kortið. Áðrenn var frádømingin treytaleys, og førarin misti koyrikortið uppá standandi fót.

# Maður tikin eftir húsaófrið

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Ein maður varð mánanáttina tikin av løgregluni í Vágunum. Hann var komin til ilnar við foreldrini, og løgreglan mátti boðsendast.

Maðurin var ávirkaður av rúsdrekka, og løgreglan tók hann við í varðhaldið. Mánamorgunin varð hann leyslatin aftur.


Sosialurin

Rør & Blikk

Vegna vaksandi virksemi verður søkt eftir fólki at arbeiða innan rør og blikksmíð

Góð løn

Nærri fæst at vita um starvið á:
Tlf.: 322 999 far.: 225 345

Rør & Blikk fast umframt alt vanligt rør, blikk og smiðjuarbeiði, eisini við vatnviðgerðaranlegg til svinjihylar.

Rør & Blikk
Undir Gráasteini 65 · 100 Tórshavn
tlf. 322 999 · far. 225 345
www.rorblikk.fo



Lægstu rentu – í mesta lagi...

Við Rentulofti fært tú trygd móti høgari rentu og kanst liva við, tá ið rentan lækkar.

Støkk inn á gólvið og fá meir at vita.

REPRO-Z · 319540

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo